LEIÐREGLUR

# Soleiðis eru vit **trygg saman**

**Vit hava øll** – venjarar, íðkarar, nevndarlimir, foreldur og onnur avvarðandi – **ábyrgd av trygd og trivnaði í ítróttaumhvørvinum**

### 1. Vit vísa virðing og umsorgan

Vit vísa umsorgan og virða onnur – bæði á leikvøllinum, í sosiala felagsskapinum og á netinum. Vit hvørki gera ella siga nakað, sum niðrar, særir ella ger onnur ótrygg.

### 2. Vit góðtaka ikki mismun, happing ella harðskap

Vit loyva ongum at happa, hótta ella misnýta onnur – hvørki við orðum, gerðum ella á sosialum miðlum. Eingin skal vera fyri mismuni í føroyskum ítrótti.

### 3. Vit virða persónlig mørk, tá ið vit nerta onnur

»Trygg nerting« merkir, at tá kropsligt samband er neyðugt, er tað altíð viðkomandi og hóskandi.

### 4. Vit góðtaka ikki kynsligan ágang

Vit góðtaka ikki støður, útsagnir og gerðir, sum kunnu tykjast ágangandi, og venjarar fara ikki í einrúm við íðkara uttan so, at tað er ein natúrlig og neyðug støða. Vit eru tilvitað, tá ið vit skriva beinleiðis á netinum, tí tað er talgilt einrúm og kann misskiljast.

### 5. Vit virða, at øll hava eitt privatlív – eisini á netinum

Vit hugsa um, hvussu og nær á døgninum vit samskifta. Vit deila ongantíð myndir ella upptøkur uttan samtykki.

### 6. Vit eru opin um tøtt sambond

Vit eru tilvitað, tá ið vit hava dupultar leiklutir – t.d. um makar ella avvarðandi eru venjarar. Vit eru opin og seta greiðar karmar, so øll kenna seg trygg.

### 7. Vit vaksnu taka serliga ábyrgd

Nevnd, venjarar, vaksnir íðkarar og avvarðandi eru fyrimyndir í atburði og orðum. Vit tosa altíð virðiliga við og um øll. Á síðulinjuni, í skiftirúminum, heima og á netinum.

### 8. Vit siga frá!

Vit leggja uppí, tá ið vit varnast okkurt, sum ikki samsvarar við hesar reglur, og vit halda fráboðanarskylduna. Tað er altíð rætt at siga frá, um okkurt kennist skeivt, ótrygt ella órættvíst. Vent tær til onkran avvarðandi, venjara, nevnd, ráðgevingina "Tryggur Ítróttur" ella viðkomandi myndugleika.

Um okkurt kennist skeivt, ótrygt ella órættvíst, kanst tú altíð venda tær til óheftu ráðgevingina Tryggur Ítróttur
**trygguritrottur.fo**

**+298 232600** (Týsdag frá kl. 19 – 21)
**ella skriva til radgevingin@trygguritrottur.fo**

**RÁÐGEVINGIN**
TRYGGUR ÍTRÓTTUR